# eftir einari viku



– Vit fóru til Hansenmann Tórgarð fyri at vita, um hann hevði áhuga í at geva plátuna út. Tá hann hevði hoyrt lagið “Eg siti so eina”, tørvaði honum ikki at hoyra meira, men játtaði beinanveg, sigur sangarin Ólavur Højgaard um bestseljaran hjá Vestmonnum, Brot. Mynd: Jens Kr. Vang

## Fakta

**Vestmenn**
Bólkurin er stovnaður í 1983.
Útgávur:
Brot, 1983
Rím, jólaband, 1984
Kanska í dag, 1985
Vit syngja Andreasen, barnaband, 1986
Vestmenn, 1988
Undir Stjørnunum, 1998
Síðani hava Martin og Ólavur givið út hvør sær, men nú er aftur ein útgáva frá Vestmonnum á veg


L. T. Studio úr at gera

Vestmenn spældu í 1985 inn fløguna Kanska Ein Dag í LT Studio í Havn

– Eg var í Klaksvík við abbasoninum, eg hugsi tað var til svimjikapping, ella okkurt tílíkt. Eg hitti Steintór, sum hevði hugsað um at fáa Vestmenn í upprunalíki á Summarfestivalin. Eg orðaði hetta við hinar í bólkinum, og allir eru vit spentir og við uppá tað. Vit hava eina sangskrá við kendu løgunum, men tað verður bland av nostalgi og so okkurt av tí nýggja, sigur Ólavur.

– Um vit venda aftur til ummælini ella umrøður, so hevur Niels Uni Dam eisini sagt ella hugleitt í grein, at Vestmenn eru fyrimynd hjá øðrum føroyskum countrybólkum, og t.d. hugleiddi hann einaferð, at tað var stuttligt, at Reverends spældu á Bryggjuni í Keypmannahavn, meðan fyrimyndir teirra, Vestmenn, spældu í Kagganum sama kvøld.

– Annars meti eg, at ljóðið hevði nógv at siga á fyrstu plátuni, og har eigur Milson sín part av heiðurinum. Hon ljóðar væl og er væl sungin. Og Martin, orðasmiðurin mikli, hevur nógv at siga, tá tað kemur til løgini og orðini, tó at allir góvu sítt íkast og vit styðja sum heild hvønn annan væl, eftirmetir Ólavur .

## Ikki fastlæstir

Ólavur metir, at ein styrki hjá Vestmonnum er, at teir hava ikki læst seg í ávísa sjangru.

– Vestmenn hava lagt onnur løg fyri dagin, enn tey løttu, sum øll kenna og syngja við til. T.d. á útgávuni “Undir Stjørnunum” eru djúp løg, har serliga Martin eigur sín lut, men vit hava eisini altíð havt løg á, ið hava “selt” útgávuna. Men læst okkum fastur hava vit ikki og aloftast hevur tilfarið verið sjálvgjørt, tó okkurt lag er lænt og okkurt hava vit tikið fram, sum annars hevði farið í gloymskuna, sigur Ólavur, og leggur hugsunnarsamur afturat, at síðstu 10 árini hevur bólkurin tó meira verið undirhaldsbólkur, ið hevur spælt meira, enn hann hevur tikið upp.

## Nýtt á veg

Vestmenn arbeiða nú við nýggjari fløgu og eini 10 – 12 løg verða ætlandi á fløguni.

– Tað verður tað góða gamla frá Vestmonnum. Bogi hevur heimastudio og vit arbeiða við at gera demo. Vit arbeiða við løgum og tekstum. Vit hava nóg mikið, men arbeiða nú í felag við at skapa fløguna, sigur Ólavur, sum fegnast um, at Vestmenn í upprunalíki nú aftur eru virknir, hóast bæði Ólavur og Martin hava sítt.

Vestmenn eru Vestmenn, slær Ólavur fast, og vit halda fram bæði saman og hvør sær.

Tað er stuttligt. Vit síggjast nokkso javnan. Nakrir okkara hava mammurnar eftir á Heygum og annars býr familja har, so vit koma javnan har. Eg eri vestmaður um ein háls. Vestmenn er vorðið eitt hugtak og ein liviháttur hjá okkum, sigur Ólavur.

Um framtíðina sigur hann: Vit halda fram at gera tónleik – hvør sær og í Vestmenn høpi. Kundi ikki hugsað mær at Vestmenn ikki var til longur – í dag er Vestmenn, umframt at vera ein tónleikabólkur, sum vit stovnaðu 1983, eisini eitt hugtak í okkara verð og ein liviháttur, sum vit hava tað gott við.